# Morten Hansen vann í Kollafirði

Leygardagin var súkkling á Sundalagagsstevnuni í Kollafirði. Tórshavnar Súkklufelag skipaði fyri súkklingini á Sundalagsstevnuni, teir vaksnu og unglingarnir súkklaðu teinin úr Kollafirði norður til Áir, ið er 21 km. Vinnari gjørdist Morten Hansen við tíðini 35.14, bara 6 sek. aftaná kom Anders Joensen á mál, nr. 3 gjørdist Jógvan Djurhuus við tíðini 37.50. Nr. 1. Morten Hansen 35.14. Nr. 2. Anders Joensen 35.20. Nr. 3. Jógvan Djurhuus 37:50. Nr. 4. Evald Rasmussen 41:41. Nr. 5 Jóanis Albert Nielsen (Unglingi) 48:57. nr. 6 Henry Berg 49:12



# Odmar Færø aftur í B36

arbeiðir við at styrkja sær liðið til seinnu hálvu av Vodafonedeildini, og tað er í øllum førum greitt, at Odmar Færø aftur fer at spæla fyri B36, har hann hevur fingið tað mesta av sínum fótbóltsliga uppvøkstri, umfram at hann var eyðsýndur í fjør. Tað váttaði venjarin Mikkjal Thomasen í sendingini 3. hálvleikur á Rás2 í gjár. Odmar Færø hevur spælt í Danmark seinastu tíðina, men leitar nú heimaftur at spæla. Odmar Færø er ein av spælarunum á U21 landsliðnum.

Víkingur-HB 2-3 (1-1):

# HB hevur kós móti gullinum

*Víkingur*

*HB*

**HB hevur av álvara lagt sjógv millum seg og mótstøðuliðini í Vodafonedeildini. Tað var aftur staðfest í gjár, tá teir reyðu og svørtu vunnu á útivølli móti nærmastu kappingarneytunum**

FÓTBÓLTUR
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*



*Fróði Benjaminsen og liðfelagarnir í HB hava sett snórabeina kós móti FM-gullinum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Tá Andrew av Fløtum í Sarpugerði í gjár brádliga snýtti Niclas Niclasen og smekkaði til móti málinum úr góðari støðu, varð tað aftur staðfest. Tað varð staðfest fyri Geza Turi í málinum, venjaratoyminum hjá Víkingi, áskoðarunum við vøllin og restini av Føroyum. HB eigur í løtuni besta fótbóltsliðið í landinum.

Høvuðsstaðarfelagið hevur lagt sjógv millum seg og hini liðini. Longu nú eftir 13 umførum eru heili átta stig niður til nærmastu kappingarneytarnar. Og tað er eingi tekin um, at tað steðgar her.

## Frálíkur fótbóltsdystur

Víkingur hevði í gjár upplagdan møguleika at leggja trýst á HB í oddastríðnum. Kravið var sjálvsagt trý stig, tá teir reyðu og svørtu vitjaðu. Og tað sást týðiliga, at tað ikki var serliga týdningarmikið, hvussu stigini vórðu vunnin.

Fótbóltsspælið var ikki flott undan hvíldini. Serliga heimaliðið royndi seg oftast við langum sendingum, og tað riggaði í løtum at trýsta gestirnar á hendan hátt. Andreas Lava Olsen royndi at skapa órógv við sínum skjótleika og heimagjørdu fintum, men HB-verjan hevði oftast tamarhald á.

Mortan úr Hørg legði gestirnar á odda tíðliga í dystinum. Av brotsteigarmarkinum smekkaði vongverjin til, og umvegis ein mótstøðuleikara, sendi hann seg sjálvan og liðfelagarnar á sigurskós. Men gleðin var stokkut.

Lítla løtu seinni javnaði ungi Finnur Justinussen, sum, saman við Súna Olsen, Zoltan Bukzegi og Atla Gregersen, hevur myndað liðið hjá Víkingi í hesum kappingarárinum. Framherjin royndi seg væl úti frá, tá Símun Rógvi Hansen noyddist í málið eftir bóltinum. Og sami Finnur Justinussen var aftur upp á spæl, tá seks minuttir vóru leiktir av seinna hálvleiki. Hann stýrdi bóltinum í málið eftir innlegg úr vinstru.

Stríðsviljin hjá gestunum var fyrimyndarligur. Hóast mótgongd smæddust teir ikki burtur, og sanniliga fingu teir reyðu og svørtu løn fyri stríðið. Á tímanum smekkaði Bjarni Jørgensen til bóltin eftir hornaspark, sum brast í tvørstræið, áðrenn hann fór um málstrikuna. 2-2.

Í seinna hálvleiki var fótbóltsspælið væl betri. Gestirnir løgdu dent á at flyta bóltin fyri at sleppa undan nærdystunum, og tað eydnaðist fyri tað mesta. Møguleikarnar vóru eisini fleiri, og einu ferðina sendi Fróði Benjaminsen í stólpan.

Men tá tríggir minuttir restaðu í brast fyri nev. Andrew av Fløtum gjørdist sigursharri, og staðfesti tryggu oddastøðuna hjá HB.

## Beina kós

Víkingur var annars liðið, sum tey flestu mettu høvdu besta møguleikan at steðga HB. Felagsliðið hevur av álvara havt vind í seglunum, men sjálvsálit var ikki nóg mikið, tá oddaliðið vitjaði. Og í Gøtu og Leirvík vóru tey sjálvsagt vónbrotin av, at tað ikki eydnaðist at vinna seg nærri oddanum. Men samanumtikið kunnu tey ikki vera annað enn nøgd við kappingarárið, tí liðið er í steypafinaluni og hevur kós móti altjóða fótbólti í 2010.

HB vísti fleiri eginleikar í Sarpugerði í gjár. Liðið stríddist, spældi fótbólt, høvdu skipaðan verjupart, hildu høvdið kalt, tá mest stóð á, skutu trý mál og spældu við nøgvum yvirskoti. HB eigur besta liðið í føroyskum fótbólti í løtuni. Tað varð dyggiliga staðfest í gjár.

## Dýr mistøk

**Jógvan Martin Olsen, venjari hjá Víkingi, var sum heild hampuliga væl nøgdur um spælið hjá sínum monnum.**

**- Í fyrra hálvleiki haldi eg, at vit eru greitt omaná, og vit fáa síðurnar hjá okkum væl við. Í seinna hálvleiki gekk meira javnt á, men sum heild var talan um ein sera tættan og intensan dyst.**

**- Men fyri okkara viðkomandi kunnu vit iðra okkum tey persónligu mistøk, sum kosta okkurt av málunum, sum HB fær.**

**Sigurin hjá HB ber við sær, at havnarliðið er átta stig undan næstu liðunum. Men hóast uppgávan er trupul, so metir Jógvan Martin Olsen ikki, at tað er ógjørligt at vinna munin aftur.**

**- Tað er sjálvandi ikki ógjørligt, men tað er nú ikki av tilvild, at HB liggur har, sum teir gera. Teir spæla góðan fótbólt, og so duga teir eisini at gagnnýta sínar møguleikar, og har er Andrew av Fløtum heilt framúr. Til dømis skapar hann sjálvur málið til 3-2, og tað er ein dygd, sum HB hevur í størri mun enn hini liðini, sigur Jógvan Martin Olsen.**

**-mørk**

## Sjey nýggj føroysk met

Nú bara ein vika er eftir til fyrsta dagin hjá bogaskjúttunum á Oyggjaleikunum á Álandi, er líkt til, at føroyska liðið er sera væl fyri. Í dag var seinasta felagsvenjingin, sum eisini var stuðulsskjóting, og ikki færri enn sjey nýggj føroysk met vórðu skotin á Tórsvølli í gjár.

Sigrid Vang gjørdi bart, og skeyt 1336 av 1440 møguligum stigum við sínum 144 pílum. Til samanberingar er Oyggjaleikametið 1299 stig, sum Sigrid Vang sjálv skeyt á Oyggjaleikunum seinast. Umframt samlaða metið, setti compoundkvinnan eisini met á 70 metrum og 60 metrum, ið eru longru teinarnir hjá kvinnum.

Eisini Absalon Hansen í recurvebólkinum, setti nýtt føroyskt met, tá hann skeyt 1219 stig. Fyrr í ár setti Absalon Hansen eisini nýtt føroyskt met, men tað var eitt sindur lægri. Oyggjaleikametið er 1205 stig, og tað varð skotið í 1995.

Absalon Hansen setti somuleiðis met á 70 metrum. Stigatalið bleiv 314 stig.

Albert Dam og Jógvan Niclasen skutu somuleiðis føroysk met í compoundbólkinum fyri menn. Albert Dam fekk 343 stig av 360 møguligum á 70 metrum og Jógvan Niclasen skeyt 356 av 360 møguligum stigum á 30 metrum. Hetta merkir, at tað bara vóru fýra pílar, sum ikki raktu miðjuna!

Umframt føroysku metini, so fingu Magnus Andreassen og Rakul Dam í compoundbólkinum og Jastrid M. Jensen, Torfinn Hansen og Eirikur í Jákupsstovu í recurvebólkinum persónlig met.

**-mørk**